# Reingerðingsfólk

Søkt verður eftir reingerðingsfólki til Advokatfelagið við Strond 4, skjótast tilber. Reingerðingsarbeiði fevnir um 4t dagliga.

Skrivlig umsókn verður at senda til Advokatfelagið við Strond 4, att. Agnes Tausen, Postbox 359, 110 Tórshavn, ella sum teldupost til agt@lawfirm.fo

**ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4**

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

# Matseðil

Hósdagin 29. apríl
**Svínakambur / Stoktur medistari**

Fríggjadagin 30. apríl
**Stongt**

Leygardagin 1. mai
**Hunangsglaserað skinka**

Mánadagin 3. mai
**Fiskafrikadellur / Hamburgaryggur**

Týsdagin 4. mai
**Høsnarungabringa / Rullusteik**

Mikudagin 5. mai
**Stoktur fiskur / Kjøtfrikadellur**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**

# Til sølu

**Mazda B-seria 2500 turbo Intercooler**

- Glasfipur kalesju
- 4 píkadekk á felgum
- Árg.: mai 2003
- Koyrt: 189.000 km



Er áhugi ring **585 750**

LØGTINGIÐ

# Ráðgevi í Løgtinginum

Í umsiting Løgtingsins er eitt starv sum ráðgevi leyst at søkja til setan 1. august 2010.

**Arbeiðsuppgávurnar verða hesar:**
- Mótvegis stjóranum hava ábyrgd av, at øll mál eru løgfrøðiliga røtt
- Nevndarskrivari og løgfrøðiligur ráðgevi í 3 tingnevndum
- Eftirkanna lógaruppskot og vera løgfrøðiligur ráðgevi hjá flokkum og tingmonnum í málum, sum natúrliga hoyra til omanfyrinevndu nevndir og
- At luttaka í vanligari málsviðgerð í umsiting Løgtingsins.

**Uppgávur hjá umsiting Løgtingsins eru í stuttum hesar:**
- at taka sær av øllum umsitingarligum uppgávum Løgtingsins
- at vera ráðgevi hjá Løgtingi og løgtingsnevndum í øllum løgfrøðiligum spurningum, herundir at ansa eftir, at øll mál eru løgfrøðiliga og málsliga røtt
- at røkja skrivarauppgávur í Løgtinginum og løgtingsnevndum
- at taka sær av skrivarauppgávum hjá Løgtingsins sendinevndum í Norðurlandaráðnum og Útnorðurráðnum

Í umsiting Løgtingsins arbeiða í løtuni 10 fólk, harav 2 løgfrøðingar.

Tann, sum settur verður, skal hava lokið prógv í løgfrøði og hava áhuga fyri politiskum og samfelagsligum viðurskiftum.

Umsøkjarar, sum hava royndir við at gera lógaruppskot ella at eftirkanna hesi hava fyrimun
Talan er um eitt fulltíðarstarv, men møguleiki er eisini fyri at gera avtalu um niðursetta tíð.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og BLF.

Tann, sum settur verður, má tola broytingar í arbeiðsuppgávunum.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Súsonnu Danielsen, stjóra, á tel. 363900 ella susannad@logting.fo.

Umsóknir saman við prógvum, frágreiðing um størv frammanundan og møgulig ummæli skulu vera umsiting Løgtingsins, Tinghúsvegur 1-3, Postrúm 208, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin, 21.mai 2010, kl. 16.00.

*Løgtingið, 27. apríl 2010*

**Sosialurin**
www.sosialurin.fo

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Endurlýsing

# Lærarastørv í Mykines Skúla og Kirkju/Hattarvíkar Skúla

Søkt verður eftir útoyggjalærarum til Mykines Skúla og Kirkju/Hattarvíkar Skúla. Størvini verða sett frá 1. august 2010.

**Um størvini**
Útoyggjalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur alla undirvísingina í skúlanum. Størvini eru fulltíðarstørv.

**Søkt verður eftir útoyggjalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgdina av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- í samstarvi við foreldrini skal virka fyri, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt
- skal hava regluligt samstarv við ein størri skúla í kommununi ella í økjunum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Um eingin lærari søkir starvið, verður umsøkjari, ið ikki hevur fólkaskúlalæraraútbúgving, settur í starvið skúlaárið 2010/2011.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Størvini eru flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av læraraprógvi, skeiðum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu vera Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi týsdagin 11. mai 2010 .

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um størvini, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 306500.

*Tórshavn, 26. apríl 2010*

**Mentamálaráðið**

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

**Hoyvíksvegur 72 · Postrúm 3279 · FO-110 Tórshavn**
**Tel. 30 65 00 · Faks 30 65 55 · mmr@mmr.fo**